# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Løgmansembætið sum glapp av hondum

Hvønn umboðar Eirikur Lindenskov, spyr Lisbeth L. Petersen í lesarabrævi her á síðuni í dag. Tað er fallið henni fyri bróstið, at Sosialurin hevur skrivað um hendingina, tá Lisbeth L. Petersen fekk høvi at gerast Føroya Løgmaður, men takkaði nei, tí hon ikki vildi hava Heðin Mortensen til borgarstjóra.

Sosialurin var sjálvandi ikki á hesum samgongufundi, so vit kunnu bara endurgeva tað, sum onnur hava sagt okkum. Vit hava spurt umboð úr øllum flokkunum, sum vóru til staðar, og øll siga við ein munn, at Lisbeth L. Petersen ikki vildi hava Heðin Mortensen at yvirtaka borgarstjórasessin.

Og tað var júst hetta, vit vildu lýsa í greinini, at Heðin Mortensen hevur verið ein »trupulleiki« fyri Sambandsflokkin fleiri ferðir, og at hetta kostaði Lisbeth L. Petersen høvið at gerast Føroya Løgmaður. Í 1990 kostaði tað eftir øllum at døma Sambandsflokkinum fólkatingssessin, at Heðin Mortensen ikki var á listanum, og í 2004 kostaði tað Sambandsflokkinum borgarstjórasessin í Tórshavnar Kommunu, at hinir býráðslimirnir hjá flokkinum ikki vildu hava Heðin Mortensen í borgarstjórasessin.

Hvussu leikur fer í málinum um nýggja fíggjarmálaráðharran - sum fekk øði í grindina hesaferð - frætta vit helst nærri um seinni í dag.

Men Listbeth L. Petersen skal vita tað, at Sosialurin rennur ikki ørindi fyri ávísan politiskan flokk ella ávísar politikarar. Okkara aðaltáttur er at lýsa mál frá fleiri síðum til tess at fáa veruleikan fram.

Men veruleikin kann vera illa lýddur - og uppfatanirnar kunnu vera fleiri. Í hesum føri eru tað fleiri av býráðslimunum í Tórshavnar kommunu í 1994, sum hava aðra uppfatan enn Lisbeth. L. Petersen.

**Sosialurin**

## Hvønn umboðar Eirikur Lindenskov?

**LISBETH L. PETERSEN**
Sambandsflokkurin



Havi lisið grein í Sosialinum 10 mai undir heitinum "Heðin "kostaði" Lisbeth løgmanssessin í 1994" , men kennist ikki heilt við tað, sum Eirikur Lindenskov har skrivar m.a. um ein samgongufund í tí sambandi.

Mær vitandi luttók Eirikur ikki á interna samgongufundinum, ið var á formansskrivstovuni seint eitt kvøldið, tá Sambandsflokkurin bíðaði eftir svari frá mær um løgmanssessin, ið stóð mær í boði júst tá.

Eg hevði boðið samgonguni á fund, tí eg vildi skatta dýpið, hvat kundi hent, um eg tók av tilboðnum.

Hvat hendi kunnu bæði Eirikur og onnur lesa á síðu 372 og 373 í frálíku bókini um Sambandsflokkin, sum Anja Andreasen hevur skrivað.

Bæði Schumann Hjaltalin og Heðin Mortensen vóru umrøddir har, og tá semja ikki fekst um tey nøvnini, er tað rætt at eg spurdi, um Eilif Samuelsen, ið so hevði komið inn fyri meg í býráðið, kundi verið eitt uppskot.

At eg skuldi seta júst tað sum treyt, er beinleiðis ósatt, men treytin var, at Sambandsflokkurin varðveitti formanssessin. Sum umrøtt í bókini setti Tjóðveldisflokkurin krav um sessin, og tað kundi eg sum umboð fyri Sambandsflokkin als ikki góðtaka. Vit fóru til hús, og næsta morgun boðaði eg Sambandsflokkinum frá, at eg ikki tók av.

Soleiðis gekk tann fundurin.

Hvørjar"sannleiks-apostlar" Eirikur hevur tosað við, kann eg bert gita, og hvønn Eirikur Lindenskov umboðar við greinini veit eg heldur ikki, antin tað so er Javnaðarflokkin ella eitt "politiskt óheft" tíðindablað, ið vit, sum enn gjalda til Føroya Tele, eru við til at gjalda fyri.

At enda kann eg bert siga, at eg tíverri havi ringar royndir av at trúgva uppá avtalur við Javnaðarflokkin í býráðnum, so eg ivist ikki í, at har trívist Heðin Mortensen væl.

Tórshavn 12 mai 2007

## Politiskur sjónleikur

**HJALMAR N. POULSEN**



Formaður Sambandsfloksins langar nú út eftir løgmanni og ákærir hann fyri avtalubrot. T.v.s. orðloysingurin hevur spilt alt spælið.

Jú, spennandi verður at frætta, hvat víðari fer fram í politiska sjónleikinum.

Trupulleikin skuldi loyst seg sjálvan, tí sjálvsagt er neyðugt hjá einum eftirkomandi fíggjarmálaráðharra at duga at "leggja tvey og tvey saman" fyri at røkja starvið.

Vónandi hevur floksleiðslan nú til síðst eisini tikið hetta til eftirtektar og biðið formannin taka hædd fyri slíkum í metingum sínum.

## Allir partaeigarar hava fingið upplýsingar

**TÍÐINDASKRIV**
*P/F Thor*

Síðani greinin um Thor og felagið Ocean Group stóð í seinastu útgávu av Vinnuvitan, hava aðrir partar í málinum gjørt viðmerkingar og lagt okkum undir ymiskt, sum ikki er í tráð við veruleikan.

Tað, sum stendur í nevndu grein, sum byggir á eina samrøðu við okkum báðar, kunnu vit standa inni fyri og vit ætla okkum ikki undir nakað longri tjak um málið. Nevnda grein lýsir okkara fatan av málinum og fólk kunnu so sjálvi meta um málið eftir at hava lisið tær viðmerkingar, sum hava verið til greinina.

Bert hesar fáu viðmerkingarnar til greinina hjá Magnus Gudmundsson og Elias Christophersen í Sosialinum tann 7. mai 2007:

Eingin partaeigari hevur nakrantíð biðið okkum um upplýsingar, ella biðið um at fáa fund uttan at slíkt ynski er eftirlíkað.

Tað fyrsta vit hoyrdu um, at onkur partaeigari møguliga var ónøgdur við viðurskifti í felagnum var tá vit fingu bræv frá íslendskum advokati við ynski um fund. Tann fundurin var hildin í Hósvík.

Hetta var eftir at allir hesir partaeigar høvdu skrivað undir eina avtalu, har teir bundu seg at selja partabrøvini saman og vit vita fyri vist at teir eisini høvdu fingið boð uppá teirra partabrøv uttan at vit vóru kunnaðir.

Á fundinum í Hósvík vórðu vit spurdir um ymisk roknskaparlig viðurskifti, ma. um tað rokning, teir báðir í greinini nevna. Sjálvandi eru øll fíggjarligu viðurskifti okkara í lagi og vit bjóðaðu teimum at koma at kanna øll viðurskifti, evt. saman við grannskoðara, men tað tilboðið tóku teir ikki av.

Viðvíkjandi tí láni frá Eik, sum teir nevna, er at siga, at tey viðurskiftini eru øll lýst í partaeigarasáttmála. Talan er um eitt lán, sum frá byrjan varð avtalað.

Sum nevnt er alt tað, sum stendur í fyrru blaðgrein okkara rætt, men vit skulu tó viðganga at vit ikki áttu at kalla nakran fyri landasvíkjara, ella quisling. Tey orðini taka vit aftur.

Hósvik, tann 9. maj 2007

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Eyðhild Jacobsen eydhild@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
| --- | --- | --- | --- | --- |
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.